

# ROKKSTJØ

Teir eru havnarmenn vi
gittar og syngja, og
Báðir eru frontmenn í
ið júst hava verið í Í
í 200, sum spældi fýra
í oktober, og Frans í
vikuna hevur verið í

**ROKKSTJØRNUR**

**Niels Uni Dam mailto:nielsuni@ sosialurin.fo**

Niels er í løtuni største rokkstjørnan í Føroyum. Í 200 er hann ein tann mest markanti fronmaðurin í føroyskum tónleiki nakrantíð og uttan iva tann stuttligasti. Hann luttekur av og á í ymiskum øðrum verkætlanum, men 200 er hjartabarnið, og einasti bólkurin hann spælir fast við. Frans har afturímóti, spældi fyrr í ár í fimm bólkum, og er í løtuni virkin í trimum. Hann spælir gittar og syngur í harða rokkbólkinum 48 Pages, spælir gittar og syngur kór við Føroya harðastu rokkarum Sic, og í svaka eksperimentarandi bólkinum The Headliners syngur hann og spælir gittar. Frans er eitt gott boð uppá eina komandi føroyska rokkstjørnu.

## 12 ár á muni

Aldursmunurin á Niels og Frans er 12 ár og tey, ið kendu Niels fyri tólv árum síðan, minnast ivaleyst Tungmálm 93, har Niels var á pallinum við trimum bólkum á rað, sum bassleikari og sangari í føroya fyrsta trasjbólki Oblivion, gittarleikari í rokkrappbólkinum MC-Hár og sangari í Betrayer, ið mest líktist einum Metallica hermarabólki. Kvøldið eftir spældi hann sína fyrstu konsert við Mold í Sjónleikarhúsinum. Tað er ikki eiðasørt, at teir líkjast Niels og Frans, men teir eru jú eisini beiggjar.

## The Galáns

Gulu húsini við stóra garðinum á Tinghúsvegnum beint við SMS hava fostrað nógvan góðan tónleik, allir fýra beiggjarnir hava tónlistarligar gávur og sambært Frans, so er hansara største dreymur, at teir allir fýra fara at gera eitt beiggja orkestur, tí einki er kulari enn eitt beiggja orkestur, sigur hann. "Vit kundu iti Galánarnir ella The Galáns, Niels hevur skotið upp, at vit eita Niels og Galánarnir" vil hann vera við og flennur .

Niels sigur, at hann heldur ikki ivast í, at teir fara at jamma í framtíðini, aldursmunur sæst betrið, jú, yngri tú ert, og seinni fer tað óivað at verða enn meira upplagt.

## Pínlig konsert

Niels minnist aftur á Tungmálm 93, sum eina sera pínliga konsert. Hann dugdi væl sjálvur at síggja tað klikkaða í at spæla við í trimum bólkum á somu konsert. "Tá tú spælir í fleiri bólkum, so býtur tú teg í fleiri partar, og jú fleiri partar, jú minnið gerst hvør teirra", sigur hann, men leggur tó dent á, at Frans enn er so ungur, at hann lærir nógv av tí. Hansara bólkar eru so øgiliga ymiskir, at hann mennir seg nógv bæði sum gittarleikara og sum tónleikara.

Frans sigur, at tá hann spældi við fimm bólkum, var tað strævið, men nú er tað fínt: "Eg leiti enn tónlistarliga, og tí tími eg ikki at binda meg niður í ein stíl. Tað er týdningarmikið at eksperimentera eitt sindur. Eg tími væl at spæla rokk í 48 pages og Sic, men í Headliners sleppi eg eisini at spæla blús og ymiskt annað".

## Niels lánti gittarin hjá Frans

Niels byrjaði at spæla gittar, tá hann var trettan ár. Fyrstu nógvu árini lænti hann gittaran hjá Frans. Frans hevði fingið ein gittara í dópsgávu frá pápa sínum. Hann var tó enn dekan ov lítil til at spæla á gittaran, so eldsti beiggin lærdi seg at spæla í staðin. Fleir ár seinni lærdi Frans seg at spæla á sama gittari. Tá helt hann, at hetta var gittarin hjá Niels, men so var ikki.

## Niels vísti vegin

Niels sigur, at hann minnist Frans, sum eitt øgiliga musikalskt barn, men minnist ikki nakað um, at hann hevur lært hann at spæla gittar. Hann búði niðri, tá Frans byrjaði at spæla, og tí hevði hann ikki so stóra ávirkan. Hann leggur afturat,